## Gåte vitjar aftur í Føroyum

**Norski rockbólkurin við teimum sermerktu sangunum fer at hava konsert í Mentanarhúsinum í Fuglafirði um tvær vikur**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Miðskeiðis í apríl mánaði fer norski rockbólkurin Gaate at hava konsert í Føroyum. Bólkurin hevur einaferð áður vitjað her – tað var á G! Festivalinum í fjør – og tað vóru tað mong, sum løgdu merki til hendan sermerkta rockbólkin, sum blandar gamlan norðurlendska fólkatónleik saman við nýggjastu rákini innan rocktónleikin.

Bólkurin Gaate er lutvíst nýggjur – kom við sínari fyrstu fløguútgávu í 2002 – men hann hevur frá byrjan verið nógv umtalaður í Noregi og hevur selt væl.

Gaate hevur eisini spælt til hópin av konsertum í Noregi og í øðrum londum, og seinni í ár skulu teir millum annað hava konsertir í Týsklandi.

### Ein sterkari eind

Teir fimm tónleikararnir í bólkinum vóru í fjør í upptøkuhølunum aftur, og tá varð úrslitið fløgan Iselilja, har tað verður arbeitt víðari við samanrenningini millum fólkatónleik og rock.

Kåre Christoffer Vestrheim hevur produserað tónleikin á fløguni, og hann er um nakar maðurin aftanfyri, at norskur fólkatónleikur hevur havt stóra framgongd seinnu árini.

– Hugskotið við tónleikinum á Iselilja er, at yvirgongdin millum rock og fólkatónleik skal verða enn meira organisk. Tað skal vera truplari at gita, hvat er traditionellur tónleikur og hvat er tónleikur hjá bólkinum, sigur hann á heimasíðuni hjá Gaate.

Konsertin við Gåte verður í Mentanarhúsinum í Fuglafirði leygarkvøldið 16. apríl, og umframt norska bólkin fer ein føroyskur bólkur at hita upp.

# Føroya Banki vunnið almennar pengar aftur

**Á aðalfundinum hjá Føroya Banka hósdagin varð staðfest, at bankin nú hevur vunnið hvørja krónu aftur, sum landsstýrið fyrst í 90'unum mátti veita bankanum. Tað, sum í fyrstu syftu líktist eini almennari hjálp, er endað við eini skilagóðari íløgu hjá landskassanum, sum kann vinna pengar burtur úr íløguni**



*– Í Føroyum hevur nú leingi verið tosað um at einskilja almennar fyritøkur. Nógv klók álit eru skrivað, uttan at nakað yvirhøvur er komið burtur úr. Tað tykist, sum tey mongu álitini gera, at málið kemur í drag, sigur nevndin Føroya Banka í sínari ársfrágreiðing*

FØROYA BANKI
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

– Við roknskapinum, sum vit í dag leggja fyri aðalfundin til góðkenningar, hevur Føroya Banki - krónu fyri krónu - vunnið aftur ta peningaupphædd, sum landsstýrið í 1992-93 noyddist at veita bankunum.

Soleiðis byrjar ársfrágreiðingin frá nevndini í Føroya Banka, sum varð latin á aðalfundinum hóskvøldið.

– Eftir bert 11 árum vann Føroya Banki allan peningin aftur. Landsstýrið hevur sostatt møguleika fyri at fáa sín pening aftur, og helst eisini við vinningi.

Landsstýrið noyddist fyrst í 1900'unum at veita bankunum ikki minni enn 2.685 mió. kr. Síðan samanleggingina í 1994 hevur bankin goldið 214 mió. kr. í skattum og avgjøldum. Partaeigararnir – sum í høvuðsheitum er landsstýrið – hava fingið 921 mió. kr. í vinningsbýti, og á kontuni fyri eginpening standa nú 1.557 mió. kr.

### Rættan veg hóast stór tap

Føroya Banki hevur ikki bara vunnið pengar árini síðani 1993, tí bankin hevur onkur ár havt stór tap.

– Tað eru uttan iva tey, sum halda, at vit eru komin til skorin klæðir, tí kapitalveitingin fyrst í 90-árunum varð sett á burturleggingarkontuna - ella løgd í frystigoymsluna, sum onkur hevur tikið til - og at vit síðan bert hava kunnað tiðnað burturleggingarnar upp aftur og inntøkuført tær yvir raksturin.

– Nakað er um tað, men hinvegin hevur Føroya Banki síðan 1992 avskrivað ikki minni enn 3,6 mia. kr. sum endaliga mistar. Tapini hjá bankanum hava sostatt verið 900 mió. kr. størri enn kapitalveitingin frá landsstýrinum. Í bankanum hava vit ikki bert sett av ímóti tapi. Vit hava eisini havt tap, stór tap, stendur at lesa í ársfrágreiðingini.

– Leiðslan í bankanum hevur sæð tað sum sína fremstu uppgávu at avmarka tapið hjá landsstýrinum mest møguligt. Tað kann ikki verða eitt mál í sjálvum sær at tapa mest møguligt, og tað er gleðiligt hjá bankanum, landsstýrinum og hjá okkum øllum somlum, at peningaveitingin frá landsstýrinum ikki varð tapt.

### Klók orð forða fyri einskiljing

Nevndin í Føroya Banka staðfestir í sínari ársfrágreiðing, at landsstýrið kann fáa pengarnar aftur, sum landið setti í bankanum í 90'unum.

– Millum politikarar hevur ofta tað sjónarmið verið at hoyrt, at bankin má vinna aftur almennu peningaveitingina í 1992-93, áðrenn landsstýrið kann selja bankan. Hetta er í roynd og veru eitt sindur løgið sjónarmið, tí landsstýrið kann júst fáa sínar pengar aftur við at selja partabrøvini.

– Bankin hevur nú í hvussu so er vunnið pengarnar aftur, og landsstýrið hevur møguleika fyri at fáa sínar pengar aftur. Ikki við at taka teir úr bankanum, men við at selja partabrøvini og harvið bankan.

Nevndin í Føroya Banka sigur seg fylgja við í orðaskiftinum um eigaraviðurskiftini hjá bankanum í spenningi, men nevndin er eitt sindur ørkymlað.

– Tað er sjálvsagt ikki leiðsla bankans, sum skal gera av um og til hvørjar treytir, Føroya Banki skal seljast. Men vit halda, at tað fer at vísa seg at verða neyðugt, fyri at fremja eina hepna sølu, at landsstýrið og Fíggingargrunnurin taka nevnd og stjórn bankans við uppá ráð í størri mun, enn higartil hevur verið gjørt.

– Í Føroyum hevur nú leingi verið tosað um at einskilja almennar fyritøkur. Nógv klók álit eru skrivað, uttan at nakað yvirhøvur er komið burtur úr. Tað tykist, sum tey mongu álitini gera, at málið kemur í drag, sigur nevndin í ársfrágreiðingini.

# Nýtt norðuratlantiskt farmaflutningsfelag

SMYRIL LINE OG BLUE WATER
*Tíðindaskriv*

Nýggja farmaflutningsfelagið, sum Smyril Line og danska farmaflutningsfelagið, Blue Water, hava stovnað, eitur Smyril Blue Water. Felagið bjóðar sínum viðskiftafólkum ein serstakan flutningshátt fyri rullandi farm við stuttum flutningstíðum

Smyril Blue Water bjóðar sínum viðskiftafólkum ein serstakan flutningshátt fyri rullandi farm millum Norðurlond, Evropa og londini í Norðuratlantshavi. Talan er um beinleiðis flutning á hjólum allan vegin frá sendara til móttakara. Á tann hátt kann felagið t.d. flyta fisk og aðrar kølivørur í óbrotnari køliketu uttan at umskipa farmin.

Smyril Line, og danska farmaflutningsfelagið, Blue Water, hava í felag stovnað nýggja felagið.

Smyril Line hevur í meira enn 20 ár rikið ferðafólka- og farmaflutning á Norðuratlantshavinum, og eitt týdningarmikið stig varð tikið, tá felagið yvirtók nýggju Norrönu í 2003. Norröna er umframt at vera bygd til ferðafólkaflutning eisini bygd til farm, og hon kann taka upp í 130 trailarar.

Blue Water hevur ræði á einum vælskipaðum flutningskervi. Felagið hevur eitt stórt netverk av flutningsstøðum í Danmark og meira enn 300 lastbilar á evropeisku lands- og motorvegunum.

### Tættari samstarv

Smyril Line og Blue Water hava í fleiri ár samstarvað á farmaøkinum, og við nýggja farmaflutningsfelagnum fara partarnir í tættari samstarv um rullandi farmin, tí nýggja felagið er tað einasta á marknaðinum, sum bjóðar ro/ro flutning á Norðuratlantshavinum.

Nýggja felagið skal avgreiða, samskipa og marknaðarføra farmaflutningin. Felagið keypir síðani pláss um borð á Norrönu og á flutningskervinum hjá Blue Water.

Smyril Blue Water fær egnar skrivstovur í Føroyum, Íslandi og Danmark.

Suðurgangandi úr Íslandi og Føroyum verður í høvuðsheitum fluttur fiskur, og norðurgangandi úr Danmark og av meginlandinum til Føroyar og Íslands verður alt slag av góðsi flutt — frá gerandisvørum til byggitilfar v.m.

Harumframt bjóðar nýggja felagið eisini farmaflutning loftvegis og bingjuflutning úr Føroyum og Íslandi út í heim umvegis heimsumfatandi netverkið hjá Blue Water av søluumboðum og 36 egnum skrivstovum í 19 londum.

Nýggja felagið vil hava so nógv, sum til ber, burtur úr samstarvinum millum Smyril Line og Blue Water. Málið hjá Smyril Blue Water er at veita ta bestu farmaflutningstænastuna á Norðuratlantshavinum grundað á ein serstakan hurð til hurð flutningshátt við stuttum flutningstíðum.